SPEKT | statsaut. revisorar

Correspondent Firm of KPMG International a Swiss Cooperative

# SPEKT søkir grannskoðarar

Um tú hevur áhuga í saman við okkum at veita føroyska vinnulívinum og øðrum fíggjarliga og vinnuliga ráðgeving, samstundis sum tú mennir tínar førleikar á hesum økjum, so er hetta rætta starvið til tín.

## Starvslýsing

Arbeiðið fevnir um grannskoðan, roknskaparhjálp og eina røð av øðrum tænastum til føroyskar og útlendskar privatar fyritøkur innan flest allar vinnugreinar, eins og til kommunur og almennar stovnar v.fl.

Vit leggja dent á, at tú ert fryntlig/ur, hugagóð/ur og fús/ur at leggja orku í hetta avbjóðandi starv. Ávís tíðarskeið er neyðugt at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð. Hetta er serliga fyrru helvt av árinum. Tað er ein fyrimunur, men ikki ein treyt, at tú hevur royndir innan grannskoðan og/ella bókhald og hevur HH-prógv ella líknandi útbúgving.

## Útbúgvingin

Umframt at fáa hollar arbeiðsroyndir gjøgnum dagliga arbeiðið fært tú eisini eina ástøðiliga útbúgving við tað at tú fylgir HD-undirvísingini á Føroya Handilsskúla. Tú fært eisini innanhýsis undirvísing hjá okkum og hjá KPMG í Danmark.

## Framtíðarmøguleikar

Aftaná lokið HD-prógv hevur tú møguleika fyri at halda fram at útbúgva teg við at taka cand.merc.aud. útbúgvingina, sum er neyðug fyri at gerast løggildur grannskoðari. Á henda hátt kanst tú hava eitt spennandi arbeiði, samstundis sum tú fært eina holla ástøðiliga útbúgving.

Møguleikarnir at menna tínar førleikar hjá SPEKT eru tí sera góðir.

## Umsóknin

Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til okkara skjótast til ber ella í seinasta lagi 10. juni 2008. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Árna Ellefsen á tel 34 34 34 ella 23 34 84 ella við at skriva teldupost til aellefsen@spekt.fo

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

*SPEKT statsaut. revisorar Sp/f grannskoða, veita roknskaparhjálp og ráðgeva í skatta- og vinnuviðurskiftum. Hjá SPEKT starvast 28 fólk. Trý teirra eru statsaut. revisorar og ein er løggildur grannskoðari. Vit arbeiða millum annað fyri einstaklingar, handilsfyritøkur, ídnaðarfyritøkur, kolvetnisfeløg, reiðaravirki, peningastovnar, fíggingarstovnar, kommunur og almennar stovnar. SPEKT statsaut. revisorar Sp/f eru tilknýtt altjóða KPMG-kervinum av grannskoðarum og ráðgevingarvirkjum.*

SPEKT stataut. revisorar Spf.
spekt@spekt.fo, www.spekt.fo

Staravegur 17, Postsmoga 3258
110 Tórshavn,
Telefon 34 34 34, Telefaks 34 34 35

Heiðavegur 15, Postsmoga 190
600 Saltangará,
Telefon 474 474, Telefaks 474 475

DEKKMASTER.FO

Fastir, lágir prísir

## Felgur við dekkum



**Bellini RS**
15" ............ úr kr. 6.400,-
16" ............ úr kr. 8.500,-
17" ............ úr kr. 9.700,-
18" ............ úr kr. 10.800,-

**Stingray**
17" ............ úr kr. 9.980,-
18" ............ úr kr. 10.880,-





**GTR-4**
17" ............ úr kr. 10.880,-
18" ............ úr kr. 12.880,-
19" ............ úr kr. 13.980,-

**Razor Black**
17" ............ úr kr. 8.980,-
18" ............ úr kr. 9.990,-
19" ............ úr kr. 11.880,-



## Fantastiskir dekkprísir

Prísdømi

| | |
|---|---|
| 175/65-14 | úr 620,- |
| 195/55-15 | úr 775,- |
| 195/65-15 | úr 795,- |
| 205/55-16 | úr 890,- |
| 205/40-17 | úr 965,- |
| 225/45-17 | úr 995,- |
| 225/40-18 | úr 1.290,- |
| 235/35-19 | úr 1.710,- |

**Annars eisini øll tey kendu merkini, sum t.d. Goodyear, Michelin, Continental, Bridgestone, Fulda v.m.**



einans 2.590,-

**Aytobe PG-63509 GPS**
Aytobe GPS við fullfíggjaðum korti yvir Vestureuropa fyri sera lágan prís. Europakortið er á einum 2GB SD korti. Alt er Plug and Play.



einans 999,-

**Baby Lite barnasetur**
Barnasetur til børn í aldrinum 0-9 mðr.
- Vind- og sólskerm
- Høvdastúttu til tey smæstu
- 3-punkts trygdarbelti
- Optimala síðuvernd
- Ergonomiskt berihandtak
- Betrekk, ið kann takast av og vaskast

...tá ið prísurin eisini er avgerandi!

Sprint skutari




Fæst í hesum litum:
- Bláur/svartur
- Reyður/svartur
- Gulur/svartur

EINANS 13.900,-

**Giantco Sprint** er ein nútímans skutari við øllum hugsandi hentleikum.
**Ein kvalitets-skutari fyri lágprís!**

**Hevur m.a.**
- 4-takts motor
- 12" alufelgur v/poleraðum kanti
- Polerað bremsugreb
- Hvít blunkljós

DM DEKKMASTER
www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

# Ískoytisútbúgving til Bachelor í sjúkrarøktarfrøði

Við heimild í Løgtingslóg nr. 2 frá 22. januar 2003 og uppskoti til kunngerð um ískoytisútbúgving til Bachelor í sjúkrarøktarfrøði byrjar ískoytisútbúgving til Bachelor í sjúkrarøktarfrøði í september 2008 á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya.

**Endamál:**
Endamálið við ískoytisútbúgvingini til bachelor í sjúkrarøktarfrøði er:

- Førleiki í sjúkrarøktaryrkinum sum vísindagrein
- Ástøðilig uppstiging av sjúkrarøktarfakligu grundútbúgvingini og royndar- og vitanargrundarlagi sjúkrarøktarfrøðingsins frá starvsroyndum
- Lestrarfyrireikandi og upptøkugevandi førleiki til master- og kandidatútbúgvingar
- Førleiki at skilja granskingarverkætlanir og sjálv/-ur at luttaka í menningarverkætlanum

**Skipan og innihald:**
Útbúgvingin er sett at vera ½ ársverk ella 30 ECTS stig og fevnir um eitt ár.

Útbúgvingin skal vera lokin í seinasta lagi 2 ár eftir, at hon er byrjað.

**Ískoytisútbúgvingin er býtt sundur í 3 eindir**

- Ein grundleggjandi kravd eind (heystið 2008)
- Ein valfrí eind (várið 2009)
- Bachelorverkætlanareind (vár/summar 2009)

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya ger av, eftir ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri, at útbúgvingarpartar, sum lesandi hevur staðið eftir reglum fyri eina aðra framhaldsútbúgving, heilt ella lutvíst kunnu koma í staðin fyri samsvarandi útbúgvingarpartar.

**Fígging:**
Útreiðslur til bókmentir og annað tilfar.

Nærri lýsing av útbúgvingini, undirvísingardagar í heyst og umsóknarblað liggja á heimasíðuni www.srfs.fo undir ískoytisútbúgving.

Eru spurningar, ber til at venda sær til útbúgvingarleiðaran á Sjúkrarøktarfrøðisskúla Føroya tlf. 352266

**Umsóknarfreist**
Umsóknarfreistin er 18. juni kl 16:00. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og øðrum upplýsingum skal sendast til:

Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya
J. Broncksgøta 25
100 Tórshavn

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250
fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo